


# Norrøna framskundar túrin til Bergen í morgin

Norrøna fer seinasta túr til Bergen í morgin, men orsakað av veðurforsøgnini siglir hon av Havnini klokkan 12 ístaðin fyri klokkan 17. Framskundaða ferðaætlanin hjá Norrønu í morgin ber við sær, at Norrøna sleppur undan meginpartinum av tí ringa veðrinum, ið boðað verður frá. Norrøna hevur seinastu vikurnar verið í dokk og fingið nýggjar stabilisatorar, ið eisini fara at gera sítt til at túrurin verður enn betur, sita tey av Smyril Line, sum heilsa, at ferðafólk verða biðin um at møta til kekk-inn í seinasta lagi klokkan 10:30. Fleiri enn 200 fólk verða við á túrinum.

# Frank skapar hús í ymiskum sniðum

**Tað var av tilvild, at hann kom inn í byggivinnuna, og tí er hann ikki bundin at vanahugsan. Nú skapar danin, sum eigur fyritøkuna Bozel, hús í nógvum ymiskum, fjølbroytt-um og forvitnisligum sniðum**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Frank Petersen heldur, at tíðin er farin frá vanahugsan innansethúsabygging, bygging av vinnubygningum og bygging av almennum bygningum og stovnum.

- Eg kann fáa ilt í búkin, tá eg síggi keðiligar bygningar, bæði í Danmark og aðrastaðni. Sama er, nú eg eri í Føroyum. Hugflogið er bæði goymt og gloymt, sigur danin, sum eigur byggifyritøkuna, Bozel í Hammel í Danmark.

Í kvøld klokkan 19 verður temakvøld í Miðlahúsinum um lágorkubygging, og tá verður danin millum luttakararnar.



*- Ein umráðandi partur er, at húsið passar til umhvørvi og náttúru. Tað skal verða stuttligt at búgva í einum Bozel-húsi, sigur Frank Petersen*

Mynd: Jens Kr. Vang

### Ikki fakmaður

Tað var av tilvild, at Frank Petersen kom inn í byggivinnuna, og nú hevur hann nógv at gera við at sniðgera og byggja hús í óvanligum sniðum – hús, sum skilja seg burtur úr mongdini. Húsini, hann skitsar niður við blýantsstrikum, gerast til sonevnd kringluhús, tornhús og hús, sum kunnu minna um eina viftu.

Næstan tað ómøguliga gerst møguligt, tá danin setir seg við tjúkka blýantinum og byrjar at tekna. Tá hann ikki er fakmaður, er hann heldur ikki fongdur við vanahugsan um, hvat kann lata seg gera – og ikki.

Tey, sum kenna virksemið hjá Frank og Bozel, siga, at danin teknar nakrar tjúkkar blýantsstrikur niður á pappír – og so letur hann fakfólk tekna og fremja ætlanina í verki.

- Úrslitið er, at bæði arkitektar og byggiverkfrøðingar hava úr at gera við at finna loysnir, soleiðis at míni hugskot kunnu fremjast, sigur Frank Petersen.

### Sum snarljós

- Hugskotini koma til mín sum snarljós av bláum himli. Eg gangi nakrar dagar og hugsi um trupulleikan, og so við eitt so kemur loysnin, sigur hann.

Á heimasíðuni hjá dananum síggja vit, at hugflogið er stórt, og eingin ivi tykist vera um, at Frank veit, hvat hann vil.

- Ein umráðandi partur er, at húsið passar til umhvørvi og náttúruna. Tað skal verða stuttligt at búgva í einum Bozel-húsi, sigur hann.

Danin var í Føroyum, tá kreppan herjaði tíðliga í nítiárunum, men steðgurin vardi bert í ein dag. Hann hevur altíð ynskt sær at komið aftur, og nú bar so á, at hann kundi koma og enn-tá steðga í nakrar dagar.

Tey, sum eru "vertir" hjá honum á ferðini í Føroyum, siga, at Frank Petersen er púrasta skotin í tí føroysku náttúruni.

- Eg síggi fyri mær fleiri serstøk húsasnið, ið kundu verið bygd ymsastaðni kring landið – og alt kann lata seg gera, sigur danin brosandi.



*Tað skerst ikki burtur, at danin Frank Jensen, sum eigur fyritøkuna Bozel, hevur stórt hugflog. Hetta er eitt av snøggu og forvitnisligu húsunum, hann er "pápi" at*

# Temakvøld um lágorkubygging í Miðlahúsinum

TEMAKVØLD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 19 verður Miðlahúsið í Vágsbotni karmur um eitt temakvøld um lágorkubygging, sum tiltakið verður rópt.

Teir, sum í fyrsta lagi fara at greiða frá, verða umboð fyri føroyska felagið Farhouse og Bozel í Danmark. Fyritøkan RenoVent, sum hevur sæti í Hósvík, verður eisini við.

Tiltakið verður í fyrsta lagi ein neyv kunning um nýskapandi bygging, bjálving og eftirbjálving, sum bæði er áhugaverd fyri privatfólk, vinnulív og almennu Føroyar.

Greitt verður frá um konstruktiónir, tættleika og bjálving, og greitt verður eisini frá fyrimunum og vansum við tøttum og vælbjálvaðum húsum og bygningum.

Skráin fyri kvøldið, sum er rættiliga áhugaverd og fjølbroytt, snýr seg um øll húsini – heilt úr erva og niður á fundamentið, soleiðis at sleppast kann undan kuldabrúgvum í vælbjálvaðu húsunum.

Kunnað verður eisini um, hvussu tú kanst byggja tær húsini úr øðrum enn tí traditionella tilfarinum, har dentur verður lagdur á eitt nú sement, flamingo, gips og viðlitað puss.

Gilli Trónd, ið starvast sum verkætlanarleiðari hjá Farhouse, sigur, at eftir framløgurnar í Miðlahúsinum verður høvi til prát um tað, ið sagt hevur verið, og tá ber eisini til hjá áhugaðum at fara í "dýpdina".